## Móðir og dóttir í Miðlan



Í hesum mánaðinum fara møðgurnar Astrid Mouritsen og Dagny Tróndheim at hava málningaframsýning í Miðlan í Klaksvík. Hetta er aðru ferð, at tær sýna fram saman. Astrid Mouritsen er úr Klaksvík, men er í løtuni búsitandi í Sørvági. Hon hevur teknað og málað frá barndómi av. Astrid hevur sýnt fram ymsastaðni kring landið seinastu árini. Dagny Tróndheim hevur altíð havt hug og evni til at skapa. Henni dámar væl at mála í frítíðini, og fæst annars við ymisk handalig arbeiði. Dagny hevur m.a. sýnt fram í Kunningarstovuni í Klaksvík, Smiðjuni í Lítluvík og Café45.

## Total 25 milliardir í avlopi

Stóra franska oljufelagið Total hevur eitt avlop, sum er væl omanfyri tað væntaða. Fyrsta ársfjórðing í ár vísti roknskapurin eitt avlop upp á 5,03 milliardir dollarar ella áleið 25 milliardir krónur. Fjórstørsta ikki stjórnarstýrda oljufelagið í heiminum sigur í tíðindaskrivi, at 9% økingin í avlopi kemur hóast olju- og gassframleiðslan ikki øktist í ársfjórðinginum samanborið við fyrsta ársfjórðing í fjør, skrivar Financial Times.

# Fáa bjóðað pólska arbeiðsmegi

**Fleiri fyritøkur verða í hesum døgum ringdar upp av einari vikarfyritøku, sum bjóðar fram pólska arbeiðsmegi fyri 190 krónur um tíman**

ARBEIÐSMEGI

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Við uppskotinum hjá samgonguni um nýggja útlendingalóg verður latið upp fyri útlendskari arbeiðsmegi. Samgongan miðar eftir at nýggja útlendingalógin skal koma í gildi 1. juli, og kemur hon tað verður tað eisini møguligt frá tí degi at innflyta útlendska arbeiðsmegi.

Tað er við hesum í huga, at ein íslendsk vikarfyritøka í hesum døgum ringir føroyskar fyritøkur upp fyri at bjóða fram pólska arbeiðsmegi. Ein av fyritøkunum, sum hevur fingið bjóðað pólska arbeiðsmegi, er Hiti.

- Talan er um eina fyritøku, ið nevnist Voot. Tey hava kontaktað okkum og bjóðað okkum pólska arbeiðsmegi, sigur Áki Mortensen, stjóri í Hita.

Hann greiðir frá, at tað einasta, fyritøkurnar skulu gera, er at hava póllendingarnar í arbeiði, so verður fyritøkan fakturerað av Voot fyri tímarnar, útlendingarnir arbeiða.

- Útlendingarnir kosta 190 krónur um tíman. Tá rindar Voot fyri innivist, mat, tryggingar og annað, sigur Áki Mortensen.

Hann sigur, at sambært Voot er talan um dugnaligt fólk, men tað kunnu vera ávísir trupulleikar við samskiftinum, tí póllendingarnir í stóran mun ikki eru so stinnir í enskum.

### Gott við møguleikanum

Sjálvur heldur Áki Mortensen, at tað kanska er í seinna lagi at fáa bjóðað útlendska arbeiðsmegi, í hvussu er innan hansara arbeiðsøki, men hevði hetta tilboðið komið í fjør metir hann, at teir helst høvdu tikið av.

- Tað er í hvussu er positivt, at tað nú verður møguligt við útlendskari arbeiðsmegi, sigur Áki Mortensen.

Hann ivast í, hvussu stórur tørvurin er á útlendskari arbeiðsmegi í byggivinnuni í dag, men innan fiskivinnuna skríggja tey eftir arbeiðsmegi.

- So har kemur tað væl við, at tað nú verður lættari hjá útlendingum at koma til landið at arbeiða, sigur Áki Mortensen.

Uppskotið um nýggja útlendingalóg tykist hava allar møguleikar at verða samtykt, tí umframt samgonguna tekur Fólkaflokkurin í hvussu er undir við uppskotinum, sum í nógvar mátar er identiskt við tað uppskotið, undanfarna samgonga arbeiddi við.

Tískil bendir alt á, at tað frá 1. juli verður gjørligt hjá føroyskum fyritøkum at fáa inn útlendska arbeiðsmegi.



*Frá 1. juli verður eftir øllum at døma lættari hjá útlendingum at koma til Føroya at arbeiða*
*Tilvildarlig savnsmynd*

# Kanna møguleika fyri nýggjari høll

**Kostnaðurin fyri umvælingina av ítróttahøllini á Hálsi er so høgur og so langt frá metingini, at Heðin Mortensen, borgarstjóri, hevur kallað inn til fundar í dag, har millum annað møguleikin at byggja nýggja ítróttahøll skal umrøðast**

ÍTRÓTTAHØLL

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Klokkan trý í dag hevur borgarstjórin í Havn, Heðin Mortensen, kallað inn til fundar. Umsiting, arkitektar bygginevnd, hallarnevnd og býráðslimir skulu umrøða tilboðini upp á umvæling av teirri nærum 40 ára gomlu ítróttahøllini uppi á Hálsi.

- Metingin hjá danska felagnum, sum hevur gjørt útbjóðingartilfarið, lá beint omanfyri 40 milliónir krónur, men lægsta tilboðið lá omanfyri 60 milliónir krónur, sigur Heðin Mortensen.

Hann vil tí hava greiði á, um frægasta loysnin er bert at gera tær allarneyðugastu ábøturnar á ítróttahøllina á Hálsi og so byggja eina nýggja høll. Ella gera allar ábøturnar fyri hesar góðu 60 milliónirnar.

- Ein leyslig meting sigur, at ein dupult ítrótta- og samkomuhøll kann gerast fyri umleið 60 milliónir krónur, sigur Heðin Mortensen.

Ein møgulig nýggj høll skal byggjast á ítróttaøkinum í Gundadali.

- Verður loysnin við at umvæla ítróttahøllina á Hálsi vald, so kann hetta gerast fyri 55 milliónir krónur um so er, at allar umvælingarnar verða gjørdar í senn, men tá verður neyðugt at stongja høllina í umvælingartíðini, sigur Heðin Mortensen.




*Ítróttahøllin á Hálsi kostar so nógv meira at umvæla, enn mett var, at býráðið nú umhugsar eina loysn sum gongur út upp á at byggja eina nýggja dupulta høll*